skemt

# Alt fyri EM



Fremstu fótbóltsspælararnir í Europa stríðast í løtuni um EM-gullið í Sveis og Eysturríki. Venjingarnar eru ymiskar, og nógv skal til fyri at standa eftir sum sigursharri. Tað er neyvan við góðum vilja, at hesir báðir sponsku landsliðsspælararnir strekkja út við einum heldur sermerktum øvilsi. Men Torres og Capdevila mugu gera nógv fyri at vinna EM.




# Royki bussar

Nú ber av. Almenni transporturin skuldi helst verið roykfríur, men soleiðis sá tað út, tá ein býarbussur í Havn tók fólk upp á mentanarnáttini herfyri. Býarbussur, snarbussur, leigubussur, ja, nógv eru nøvnini, og hesin líkist einum roykibussi.

# Vón fyri framman



Um tú vigar eitt sindur ov nógv til at kunna spæla fótbólt ella svimja kapp, so er kanska vón fyri framman. Amerikanskir fótbóltsspælarar skulu hava eitt sindur at standa ímóti við – serliga teir sum spæla verjuspæl – og so bilar kanska einki, um búkurin er eitt sindur ov stórur. Tað er munur á at skula takla ein mótspælara um koll og at gera eitt saksaspark í fótbólti.

# Í rangastrúpan

***Er okkurt komið í rangastrúpan, er hetta komið heilt skeivt í hálsin. Og soleiðis er eisini við teimum útsagnunum, sum vit hava prentað niðanfyri. Eisini hóast hesar útsagnir eru á prenti. Samstundis sum vit prenta hesar, vilja vit við hesum senda eina áheitan til lesarar okkara um at siga frá, um líknandi skeivleikar ella bara løgnar útsagnir eru at síggja í prentaðu miðlunum. Fráboðanir um hetta kunnu sendast okkum við bæði brævs- og telduposti.***

**Nýggjur fiskastovnur**
Nógvur gulllaksur í Runavík
Dimma

**Hvat merkir tað?**
Minkingin í fólkavøkstrinum í Suðuroya tykist verða steðgað
Útvarpið

**Mongu frítíðarítrivini**
Stovna felag at sigla við feskum fiski
Sosialurin

**Dýrt pappír**
Rokningin fyri mat og vín kostaði 25.000 krónur
Vikublaðið

**Vón fyri framman**
Saudiarabia ásannar, at oljan er ov dýr
Dimma

**Nýggj stavseting**
Ba mammu melda seg
www.sosialurin.fo

**Nógv ella lítið?**
Tvey skip á Klaksvík
Dimma

# Var hetta nakað fyri okkum




Føroyskar mótmælisgongur eru alt ov keðiligar. Her gera tey veruliga nakað við tað í Madrid. Nakin fólk á súkklu mótmæla bilaferðslu og viðmæla súkkling. Soleiðis kann tað eisini gerast!